# Mr Bean á val í Klaksvík

*Dorit Hansen*
*Myndir: Benjamin Rasmussen*

**Fólkatingsvalið er ikki líka sjónligt í landslagnum sum eitt løgtingsval, og valluttøkan var ikki høg á valinum í gjár. Men tó so, ein valdagur er altíð okkurt serligt. Eisini í Klaksvík, haðani henda myndafrásøgnin er**




Mr. Bean stillaði upp í Klaksvík. Tað hildu í øllum førum nøkur barnagarðsbørn úr Drotning Margetu Barnagarði í Klaksvík, sum vóru á kanningarferð í valskrídda býnum. – Men tað var bara pápi Símun, siga dreingirnir og flenna



Mikkjal Miðalberg á Ellis- og Vistarheiminum í Klaksvík hevði greitt brævatkvøðu áðrenn sjálvan valdagin. – Tað er einki loyndarmál, hvønn eg velji. Eg valdi sama flokk, sum eg altíð velji, Tjóðveldi, segði hann avgjørdur



Nógvir miðnámsskúlanæmingar vóru fyrstu ferð á fólkatingsvalið í ár. Daisy og Diana í 2. P á Klaksvíkar HF-skeiði høvdu avgjørt hvønn tær fóru at velja, men fyrst skuldi matematikkin gerast



Hanus Sørensen frá byggifelagnum Kanjon ger øki klárt til nýggjan bygning til Eik. Hann ætlaði sær eisini á val, men valið var loyniligt, segði hann



Flakakvinan ætlaði sær at velja eina kvinnu á fólkatingsvalinum. Men fyrst skuldu nøkur fløk reinskerast, og ikki var nógv tíð til politiskt prát við effektiva reinskeringarborði

